*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



***Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?***
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

# lova myrkrinum út



*Mikkjal Gaard Hansen er oddamaður í bólkinum Sic og eitt av sterkastu ikonunum, ið eru í Føroyum. Hann umboðar metallpallin her á landi og hevur gjørt tað nú í 10 ár*

*Mynd: Astrid Mohr*



*- Karl Anton bleiv til eitt slag av pápa-figuri fyri meg, tá eg ongan annan vaksnan hevði at venda mær til. Hann traðkaði inn har, sum onnur fóru út*

*Mynd: Astrid Mohr*

visti ikki av nøkrum, fyrr enn eg kom heim, og gamli knapliga flutti út. Tað var torført. Eg var øgiliga ungur og persónliga splittaður, og hetta gjørdi tað ikki betri. Men eg tók tað sum eina stóra uppgávu at blíva maðurin í húsinum og legði av við øllum misbrúkinum.

- Eg møtti damuni hjá mær, tá eg var 18. Tað, ið henni serliga dámdi við mær, var, at eg var edrúur; at eg var sterkur og kundi siga nei, sjálvt um allir mínir vinmenn ballaðust. Hon sá upp til tað. Men sannleikin var, at eg var veikur. Hon hevði bara ikki upplivað teir keðiligu tendensirnar hjá mær við alkoholi og stoffum. Tá eg var blivin 19, og vit høvdu verið saman í uml eitt ár, drakk eg meg skít í einum føðingardegi. Knapliga mintist eg, hvussu stuttligt tað var, og eg steðgaði meira ella minni ikki aftur. Ikki fyrr enn nú, fyri hálvum øðrum ári síðani.

- Eg var altíð ræðuliga depressivur, og tíðin við Krit gjørdi tað ikki betri, sjálvt um vit høvdu nógvan viðvind sum bólkur. Eg hataði tvey tey síðstu árini; hataði at venja og at spæla konsertir. Vit kundu ikki semjast um, hvat vit vildu, og at enda fór eg úr bólkinum, og hann steðgaði upp.

*Í dag er tú m.a frontfigurur í hardcore metall bólkinum Sic, sum allir føroyingar kenna. Hvar byrjaði tað?*

- Sic byrjaði við, at Eddie (Jacobsen, gittarleikari í Sic, blaðkv.) ringdi til mín. Hann spurdi, um eg tímdi at leggja rødd til eina demo, sum hann og bólkurin hjá honum vóru við at spæla inn. Eg segði ja, men tað tók mær eitt sindur av tíð at koma ordiliga upp í bólkin, tí eg vildi ikki leypa beint út í tað. Eg havi altíð sæð bólkar sum eitt forhold; at mann má ansa eftir, hvat mann bindur seg til. Eg gav tí nakrar mánaðar, inntil eg fann útav, hvat eg vildi við tí. Og so til síðst segði eg við Eddie, at tað var kul, og at vit kundu gott royna av álvara.

- Aftaná eina tíð fluttu vit til Havnar at venja í Margarinfabrikkini. Karl Anton var leiðari har tá, og hann var ræðuliga glaður fyri at fáa meg suður aftur. Hann var altíð har og skumpaði undir meg; segði við meg, at eg hevði nógv potentiali og motiveraði meg nógv. Hann var eitt slag av pápa-figuri fyri meg, tá eg ongan annan vaksnan hevði at venda mær til. Hann traðkaði inn har, sum onnur fóru út.

- Vit ballaðust ræðuliga nógv í Sic. Og jú meira vit fóru út at spæla, jú meira ballaðust vit. Men eg haldi alíkavæl, at eg dugdi nokso væl at kontrollera tí í byrjanini, men til síðst tók tað so yvirhond og endaði heilt galið, tá vit fóru í studio í Danmark í 2006. Tað var bara tvær vikur aftaná, at Karl Anton var deyður, og vit høvdu allir ræðuliga ógvusligar frustratiónir í okkum. Men vit tosaðu ongantíð ordiligt um tað, og druknaðu tað bara ístaðin.

- Hesin túrurin bleiv eitt sovorit allarhelvitis ball. Eg minnist, at har stóðu heilir innkeypsvognar av tómum fløskum í upptøkuhølinum. Eg hevði vippað leingi á kantinum til sálarligan niðurtúr. Og tá eg hyggi aftur, dugi eg eisini at síggja, at øll symptomir uppá depressión høvdu verið ávegis í langa tíð. Men eg var ikki tilvitaður um tað, og tíðin í upptøkuhølinum gjørdist ein stór bumba, sum eksploderaði omaná meg.

*Hvat var tað, sum eksploderaði?*

- Alt hetta við splittaðum samleika, at Karl Anton doyði og so alt hitt, sum er so torført at seta orð á, tað át so nógv uppá sálina. Og hesin svakligi ballingartúrurin útloysti eina fúla depressión.

- Eg gjørdist livandi-deyður. Orkaði ikki eingongd at sappa

## FAKTA UM SIC

**SIC eru:**
**Mikkjal Gaard Hansen - Sangari**
**Eddie Jacobsen - Gittarleikari**
**Frans Galán - Gittarleikari**
**Gudmar Hansen - Bassleikari**
**Magnus Hansen - Trummuleikari**

**Søgan:**
**Bólkurin varð stovnaður í 2002 av Eddie. Mikkjal byrjaði í bólkinum í 2003. Í 2005 komu Magnus, Frans og Gudmar eisini uppí bólkin, og SIC tók skap av álvara.**

**Debutfløgan hjá bólkinum varð útgivin í februar í fjør og hevur fingið framúr góð ummæli av tónleika netsíðum um allan heimin.**
**Næsta fløgan hjá SIC kemur væntandi út í 2009.**

**Finn SIC:**
**Vitja SIC og hoyr tónleikin hjá bólkinum á myspace.com/sic ella á entersic.com**